## Roykibann viðførir inntøkumiss fyri matstovurnar

Landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum ætlar, at bann skal vera fyri royking í øllum privatum fyritøkum, eisini gistingarhúsum, matstovum og kaféum. Men eitt slíkt bann kann merkja ein inntøkumiss fyri matstovuvinnuna, heldur Ása Johnsdóttir, stjóri á Hotel Hafnia

Í síðstu viku gjødu vit nógv burturúr, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at leggja uppskot fram um fullkomið roykimann á privatum virkjum – herundir eisini á gistingarhúsum og matstovum.

Forkvinna í Gistingarhús- og Matstovufelagnum er Ása Johnsdóttir, stjóri á Hotel Hafnia. Hóast hon ikki er ímóti roykfríum umhvørvi, tí hon heldur, at fleiri kundar fara at fegnast um tað, so vísir hon á www.industry.fo á, at matstovuvinnan ikki er eitt gullnám, og at flestu fyritøkurnar koyra við sera teprum úrslitið.

Hon veit ikki neyvt, hvat hetta fer at kosta matstovunum, men vísir á, at søla av tubbaki er ein marginalvøra.

Hinvegin vísir hon á tann stóra trupulleikan, sum matstovurnar hava av, at tær ikki kunnu keypa í Rúsuni upp á vanligar handilstreytir, men skulu keypa kontant fyri sama prís, sum øll onnur. – Hetta merkir, at inntøkurnar eru nógv minni enn í grannalondunum, sigur hon og eftirlýsir tí onkrar glottar heldur enn tiltøk, sum bara merkja enn truplari inntøkumøguleikar.

FF-valfundur: FF-valfundur:

# Ikki tað heilt stóra ”brakið”



*Valfundur á Vinnuháskúlanum seinasta fríggjadag. Ikki tað heilt stóra ”brakið”, men ein áhugaverdur fundur, har valevnini løgdu fram síni sjónarmið, og har fundarluttakarar høvdu høvi at seta fram spurningar til teir tríggjar, Jan Højgaard, Óla Jacobsen og Dan R. Petersen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nú líður valið í Føroya Fiskimannafelag móti endanum, og spenningur er um, hvør av teimum trimum – í bókstavarøð - Jan Højgaard, Óli Jacobsen ella Dan R. Petersen, fara at draga longsta stráið, tá ið fiskimenn hava atkvøtt. Eftir okkara tykki er ógjørligt at meta um, hvør verður í stólinum á Bryggjubakka, tá ið upptalt er**

FF-VALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir, sum seinasta fríggjadag høvdu leitað sær í Vinnuháskúlan at lýða á valfundin millum valevnini, sum eru uppstillaði til felagsformansvalið í Føroya Fiskimannafelag, upplivdu ikki tað heilt stóra ”brakið” hendan dagin.

Valevnini vóru sum heild rímiliga siðilig og uppførdu seg mannsømiliga – í sinn og skinn, sum tikið plagar at verða til.

Nógv verður sagt á einum slíkum fundi, og tað hevði ivaleyst verið troyttandi fyri nógvar lesarar, um vit endurgóvu hvørt einasta orð, sum havt var á munni.

Vit hava tí í hesi umrøðu valt at taka framløgurnar við - tað, sum tey trý valevnini í fyrsta lagi hava at siga sínum veljarum, áðrenn seinasti ”krossurin” verður settur á atkvøðuseðilin.

Sum blað hevur Sosialurin ikki gjørt so nógv burtur úr valinum, sum er fyrsta felagsformansval í FF í 18 ár. Hinvegin hevur blaðið staðið opið fyri øllum trimum valevnunum at skriva, lýsa sínar meiningar og gera viðmerkingar til hvønn annan, um hugur var til tess.

Nú líður valið móti endanum, og spenningur er um, hvør av teimum trimum – í bókstavarøð - Jan Højgaard, Óli Jacobsen ella Dan R. Petersen, fara at draga longsta stráið, tá ið fiskimenn hava atkvøtt.

Allir valseðlarnir skulu nevniliga verða grannskoðara FF's, Rasmussen & Weihe, í hendi í seinasta lagi 30. januar – og felagsformaðurin, sum tá tekur við, byrjar longu í starvinum 1. februar.

Jú, valið er spennandi, og eftir okkara tykki er ógjørligt at meta um, hvør verður í stólinum á Bryggjubakka, tá ið upptalt verður.

Møguleikin er, at Óli Jacobsen verður sitandi – í enn eitt valskeið omanyvir tey 36 árini, hann longu hevur sitið í hesum ábyrgdarstarvi.

Hvørjar møguleikar Jan Højgaard hevur at gerast nýggjur formaður, er ógjørligt at siga, men sum vit hava skilt, hevur hann dúgliga vitjað umborð á skip og hevur ivaleyst eisini sína undirtøku.

Allir føroyingar kenna Dan R. Petersen, sum umframt at vera lærari – og parttíðar fiskimaður - eisini er kendur úr løgtinginum.

Dan hevur ført hvassasta pennin í hesum valstríði.

Jú, eitt spennandi val líður nú móti endanum, og vit fara at ynskja tí, sum verður verandi – ella kemur í henda álitissess – góða eydnu og blíðan byr.

Tað, sum ræður er, er í fyrsta lagi at tæna teiri uppgávu, sum felagsformaðurin hevur.